


Thor Magni verður væntandi latin eigarunum í november

# Myndir: Fýra Thor-frálandaskip í gerð

Deil:

**Ingi Samuelsen**

20.08.2014 - 19:58

Oljan.fo

Ikki færri enn fýra føroysk skip standa í løtuni í gerð á stóru skipasmiðjuni í Besiktas í Turkalandi.

Tað er reiðaríið Thor í Hósvík, sum hevur bílagt fýra sokallað seismik support veitingarskip frá hesi skipasmiðjuni.

Í farnu viku varð fyrsta skipið, Thor Magni, sjósett á skipasmiðjuni, og Thor væntar at kunna seta hetta skipið í vinnu í november mánaði.

Hini trý skipini, sum fáa nøvnini Thor Modi, Thor Freja og Thor Frigg verða handað eigarunum so hvørt sum tey eru liðug fram móti næsta sumri. Thor hevur gjørt avtalu við norska seismikkfelagið Petroleum Geo-Service, PGS, um at sigla fyri felagið.









































